# Keyptu ikki alt

Avgerðin hjá Nordea at keypa Fionia Bank, sum Føroya Banki eisini ætlaði at fáa fatur á, fer at kosta fleiri starvsfólkum í bankanum starvið. Í sambandi við keypið hevur Nordea sagt seg vera sinnaðan at lata 400 fólk halda fram í Fionia Bank, og sostatt verða hini 150 uppsøgd, skrivar Ritzau. Samstundis er greitt, at Nordea hevur sagt nei til at yvirtaka umleið 2.000 vinnulívskundar hjá Fionia Bank. Teir hava lænt umleið 10 milliardir krónur í bankanum, og tann skuldin skal avgreiðast tey næstu árini.



# Cheney vildi leypa á

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin Dick Cheney viðgekk í einari sjónvarpssamrøðu í gjár, at hann hevði verið talsmaður fyri, at USA skuldi leypa á Iran fyri at noyða landið at gevast við sínum kjarnorkuætlanum. Men George W. Bush, forseti, var ímóti at leypa á og vildi heldur royna samráðingarleiðina. Sambært Cheney høvdu ráðgevar forsetans mælt Bush frá at leypa á Iran, tí tað hevði gjørt støðuna í Miðeystri uppaftur verri, enn hon longu var. Í samrøðuni segði Cheney, at kanska var tað hann, sum hevði havt rætt, tí Iran heldur fram við sínum ætlanum.

# Tigandi uppreistur á Sandi

**Í gjár kom fram, at fýra bygdaráðslimir á Sandi vilja hava Páll á Reynatúgvu, borgarstjóra, frá. Men nú valdar tøgn. Ongin av pørtunum vil upplýsa, hvat málið snýr seg um**

STRÍÐ
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri tíð síðan vildi Sands kommuna lata soleiðis upp, at Páll á Reynatúgvu skuldi arbeiða fulla tíð sum borgarstjóri. Hetta varð seinni slept og nú vil meiriluti í bygdaráðnum hava borgarstjóran at leggja frá sær.

Hetta seinasta skrivaði Vágaportalurin í gjár, tá hann upplýsti, at fýra av sjey bygdaráðslimum á Sandi hava sent skriv til borgarstjóran, at leggur hann ikki frá sær, so verður hann tikin av ræði.



*Brandur Sandoy er til reiðar at skifta part og gerast meiriluti saman við andstøðuni á Sandi, um Páll á Reynatúgvu ikki vil fara frá í stundini*

Tað er so tepur meiriluti í bygdaráðnum á Sandi, at bert ein skal hoppa av, fyri at borgarstjórin skal missa meirilutan.

Tá tað eru fýra, sum hava skrivað undir, so merkir tað, at ein av limunum í samgonguni ikki longur hevur álit á Pálli á Reynatúgvu. Talan er um Brand Sandoy, sum saman við Poul Klementsen, Eðvari Petersen og Fríða Nolsøe hevur skrivað undir.

Páll á Reynatúgvu vil ikki gera viðmerkingar til málið, fyrr enn hin parturin leggur kortini á borðið.

### Ein politiskur trupulleiki

Brandur Sandoy, sum er farin í parti við andstøðuni tók ikki telefonina í morgun, og heldur ikki Fríði Nolsøe, Eyðvarur Petersen ella Poul Klementsen vilja upplýsa nakað, men málið kann tykjast álvarsligt.

- Eg havi onga viðmerking beint nú. Eg veit ikki nær nakað kann sigast, sigur Fríði Nolsøe, sum heldur ikki vil upplýsa, hví hann ikki vil viðmerkja.

Poul Klementsen er heldur ikki tíðindafróður, men sigur tó eitt sindur meira.

- Tú ert vælkomin at ringja um eitt og annað, men hatta ført tú meg ikki at úttala meg um. Tí málið kann gerast keðiligari, um orð verða søgd. Vit lata málið sodna á røttum stað, og vóna at ikki meiri ballada enn neyðugt verður, sigur Poul Klementsen.

- Vit mugu diskutera tað aftur, hvussu vit gera. Eg veit ikki, um Páll vil leggja frá sær og eg havi onki hoyrt frá honum, sigur Eyðvarur Petersen.

Hann slær fast, at talan er um ein politiskan spurning og at tað ikki er nakað persónligt.

Spurdur um trupulleikin við borgarstjóranum hevur nakað við tunga raksturin av kommuni at gera, svarar Eyðvarur Petersen, hvørki ja ella nei.

- Øll mangla pengar í dag, sigur hann.

# ALV eitur Dugni




*Í morgun avdúkaði Kristina T. Larsen, stjóri í ALV nýggjan samleika. Nú skal tað eita Dugni, og búmerkið skal vísa ein spíra, sum stovnurin skal fáa brúkarar sínar til*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**åSjálvsognarstovnurin ALV skifti í morgun navn. Nýggja navnið er Dugni. Kristina T. Larsen sigur, at navnið ikki broytir nakað serligt, men kostnaðurin var 150.000 krónur**

NAVNABROYTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- ALV er ikki longur tíðarhóskandi. Tað stendur fyri avlamisvirki og tað umboðar ikki tað jaliga í virkseminum hjá okkum. Hetta er orsøkin til, at vit skifta samleika, sigur Kristina T. Larsen, stjóri.

Navnið hevur verið ALV í 53 ár, og hetta verður eisini drigið fram, sum ein orsøk til at skifta navn.

- Sjálv navnabroytingin fer ikki at broyta nakað í virkseminum hjá okkum nakað serligt, greiðir stjórin frá.

Tó leggur hon afturat, at summar av broytingunum kunnu gera virksemið léttari, og at jaliga navnið helst fer at hava jaligar ringvirkningar gjøgnum stovnin og at navnið kann gera, at miðlar og fólk kring landið fáa eina jaligari uppliving av stovninum.

### 150.000 krónur

Broytingin av samleikanum hevur kostað um 150.000 krónur, men hetta heldur stjórin í Dugna ikki vera so nógv.

- Tað kundi kostað mangt slíkt. Vit fingu eitt gott tilboð, og eru væl nøgd við úrslitið, staðfestir stjórin.

Hon greiðir eisini frá, at hetta kundi kostað nógv meiri, og at tey fáa meiri fyri pengarnar, enn tað sær út til.

### Dunið ella dugni

Spurd um Kristina T. Larsen ikki er bangin fyri, at navnið á stovninum kann uppfatast neiligt og larmandi, tá dugni úttalast júst sum dunið, so er hon avgjørd.

- Tað ger onki, um okkurt tílíkt hendir, tí tað kann bara verða gott, um vit veruliga hoyrast, staðfestir hon.